# Hevur tú hug at koyra post og frakt meðan tú ert heima millum túrar ?

Sjófólk, fólk í oljuvinnuni og aðrari vinnu, sum eru burturi og heima 3-6 mánaðir skiftandi, men ikki hava hug at liggja bakk tíðina heima, hava møguleika at fáa avloysarastarv sum bilførarar á flutningsdeildini hjá postverkinum.

Starvið er avbjóðandi og í tøttum samstarvi við kundar og deildir okkara.

Dentur verður lagdur á góðan røkiskap og nærlagni. Vit ynskja okkum jaligar starvsfelagar, ið duga væl at samskifta við kundan og starvsfólkini á øllum deildum okkara. Tú dugir væl at virka sjálvstøðugt men eisini í toymi. Tú hevur góð evni at umstilla teg í broytiligum umhvørvi og kann ganga undan. Tað er eitt krav, at tú hevur stóra koyrikortið og reina straffiattest.

Størvini verða sett skjótast til ber.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Postfelag og Føroya Landsstýri.
Talan er um fulltíðarstørv 39 tímar um vikuna.

Áhugað kunnu seta seg í samband við:
Leivur Rubeksen, leiðara
Telefon 236020
Teldupost: leru@postverk.fo

Umsókn skal verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi **28. mars 2008** á middegi.

**Send umsóknina til:**

Pf. Postverk Føroya
Stílað: Marry Poulsen, starvsfólkaleiðara
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Stutt um Postverk Føroya
280 fólk starvast hjá P/F Postverki Føroya. Hin 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alt virksemi felagsins, er á Óðinshædd í Tórshavn. Saman við samstarvsfelagum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

postverk.fo





# Kranførari til Skipasmiðjuna

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi, við stórum fjølbroytni, í eini tí størstu fyritøkuni í Føroyum?

Vit leita eftir einum kranførara við prógvi B (mobilkrana). Arbeiðið fevnir um koyring við mobilkranum okkara, bæði á deildum okkara í Tórshavn, á Skála, í Runavík og í Vestmanna, eins og runt landi. Arbeiði fevnir eisini um planlegging av arbeiði og viðlíkahald av kranunum.

Vit roknað við at tú ert røkin, álítandi, ikki bangin fyri at taka ímóti avbjóðingum og hevur lætt við at tosa við fólk.

Ring ella ein teldupost til info@faroeyard.fo, og vit taka eitt prát saman.

Tú kannst eisini senda eina umsøkn til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att: Svein Patursson

Starvið verður at seta sum skjótast

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Svein Patursson á telefon 79 11 52 ella Jens Hansen á telefon 79 11 34

- ein depil innan skipatænastur

SKIPASMIÐJAN



Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogar til Sambýlið Fugloyarveg 9, Tórshavn

Søkt verður eftir tveimum pedagogum til setan 1.apríl ella eftir nærri avtalu.

Sambýlini Fugloyarvegi 9, Grønlandsvegi 59 og í Svanga 24 eru tríggjar eindir ið eru í sama umhvørvið. Her búgva í alt 17 fólk, ið hava brúk fyri hjálp at skipa sítt heim til eitt gott og trygt stað at búgva.

Starvfólkini eru 15 í tali og rokera ímillum húsini í eini fastlagdari arbeiðsætlan. Uppgávurnar hjá starvsfólkunum er at stuðla og vegleiða búfólkunum til at klára seg í egnum heimi og at stimbra til avbjóðingar í vanliga lívinum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran, Eydnu Nicolajsen, á telefon 215424.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Sambýlið**
Fugloyarvegur 9
100 Tórshavn
Stílað: Eydna Nicolajsen

**Umsóknarfreist: 4. apríl 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



veitst tú ikki tað?
Sosialurin



www.sosialurin.fo

Haldaragjald!!!

Hava tit minst til at gjalda haldaragjaldið fyri apríl ársfjórðingin?

Steðgidagur er 31. mars.

Sosialurin